# Brynjálvur bakar í Bindslev




**Flestu uppskriftirnar á bakarínum í jútska býnum Bindslev eru føroyskar. Bakarin Brynjálvur Nordendal hevur arbeitt so nógv ár á føroyskum bakaríum, at uppskriftirnar liggja í bakhøvdinum**

## Samrøða



**Birgir W. Høgnesen**
birgir@sosialurin.fo

Jútland er eitt paradís fyri føroyingar, verður ofta haft á munni. Hetta ásannar Brynjálvur Nordendal, sum 1. oktober 2006 flutti av Fjóni til Bindslev, nærhendis Hirtshals, at reka eitt bakarí.

Tá vit á Sosialinum í seinastu viku vitjaðu í Hirtsalsøkinum, koyrdu vit til lítlu bygdina Bindslev, tí vit høvdu hoyrt, at ein føroyskur bakari helt til í bygdini.

Í hitanum hendan fagra sunnudagin - hitin var umleið 20 stig - var ikki nógv fólk í gongugøtuni í Bindslev. Orsøkin var tann, at handlarnir høvdu ikki opið sunnudag, men Sundbæks Bageri hevði opið.

Vit løgdu beinanvegin merki til bakaríið Sundbæks Bageri, sum liggur í byrjanini av gongugøtuni og ikki minni stóra úrvalið av fløtakøkum og breyði, sum stóð í handilsvindeygunum.

### Prát í bakgarðinum

So skjótt, vit høvdu sett fótin inn um, fór hurðaklokkan at "kima", og skjótt kom ein fryntlig kvinna í handlin. "God dag" segði hon, og hevði líka sum hug at halda fram á donskum, men skjótt fingu vit boða frá, at vit vóru frá Sosialinum og ynsktu at tosa við eigarnar.

Kom við út í bakgarðin, vit sita øll trý aftan fyri og sóla okkum, tað er so friðarligt ein sunnudag sum hendan, segði hon við einum smíli, vit takkaðu fyri og fylgdu eftir út í bakgarðin.

Í bakgarðinum fór henda fyntliga konan nú at borðreiða við kaffi og fløtakøkum, frá Sundbæks Bageri sjálvandi. Stutta løtu seinni kemur maður hennara Bryjálvur Nordendal, sum saman við konuni Jette og Tom beiggja Brynjálvi settu sær fyri at leiga bakaríið í Bindslev. Teirra vón var sjálvandi, at kunna selja breyð og køkur til føroyingar og onnur í Hirtshalsøkinum, og tey lata bara heilt val at.

### Funnu bakarí í Bindeslev

Brynjálvur og konan Jette hava seinastu árini búð á Fjóni. Brynjálvur hevur starvast hjá kendu chips fyritøkini KIM`s, har hann mest fekst við at krydra ymisk sløg av skrúum og ostaringum. Men bakarayrkið dró.

Av teimum trimum er tað er Brynjálvur, sum er útlærdur bakari og stendur fyri bakaríínum. Brynjálvur sigur, at hann byrjaði at læra til bakara á Tvøroyri í 1983, men gjørdi seg lidnan hjá Helga Thomsen bakara í Gøtu í 1987, og síðan hevur bakarayrkið verið mítt, so gott sum alla tíðina.

- Eftir lærutíðina fór eg til Fuglafjarðar at arbeiða á bakaríínum har, og síðan fór eg umborð á Norrrønu í eitt ár, sum bakari. Mær longdist eftir at koma í land, og síðan fór eg til bakaríið hjá Miðberg í Saltangará, sigur Brynjálvur, sum partvís er uppvaksin á Tvøroyri.

- Suðroyingum líkt, so dró

Sosialurin